## DAGSINS MEINING

# Førleikamenning og oljumentan

Seinastu tíðína hava loftmiðlarnir havt fleiri áhugaverdar tjaksendingar um avleiðingar av eini oljuvinnu. Tað er eitt gott tekin, tí er tað nakað vit hava brúk fyri, so er tað tjak og orðaskifti um hesa stóru avbjóðing. Fimmarin røddi um evnið førleikamenning og oljumentan. Tosað varð um teir pengar feløgini lata fyri at sleppa at bora. Hvat teir fara til og hvør ger tað av. Hesi 6 árini 1. útbjóðing er mett at vara hava feløgini bundið seg at lata umleið 100 mill. kr. til eitt nú førleikamenning. Feløgini gera sjálv av, hvat peningurin fer til, men skal hetta tó konfirmerast av Oljumálastýrinum.

Tá orðið førleikamenning verður brúkt verður m.a. sipað til at útbúgva føroyingar til at arbeiða í oljuvinnuni, til gransking ol. Eingin ivi er um, at tað í byrjanini av eini oljutilgongd er av stórum týdningi at kunna útbúgva og eftirútbugva føroyingar til at kunna átaka sær uppgávur og arbeiði í eini komandi olju/frálandavinnu, at menna førleikan hjá føroyskum vinnulívi, so tað er búgvið og gierað til at fara inn í nýggju vinnuna á jøvnum føti við kappingarneytar úr útlandinum. Men spurningurin er, um tað ikki er rætt at lata orðið førleikamenning nøkta ein nógv breiðari tørv í samfelagnum, soleiðis at oljupengar í hesi byrjunartíð eisini fara til eina førleikamenning sum heild í samfelagnum, eitt nú við at eftirútbúgva fólk í nógvum ymsum greinum, tað verið seg lærarar, sjúkrasystrar osfr. Sjálvandi skulu vit fyrst og fremst menna førleikan á oljuøkinum, soleiðis at føroyingar kunnu manna størvini í vinnuni. Vit mugu tó spyrja, hvussu man eisini kann menna førleikan á øðrum økjum, sum í dag bara óbeinleiðis hava nakað við frálandavinnuna at gera.

Vit mugu ansa eftir ikki at blanda tingini saman. Her og nú er talan um eina ávísa upphædd, ið feløgini lata fyri at fáa leitiloyvi. Verður framleiðsla, og inntøkur koma til samfelagið, kunnu vit av álvara fara at tosa um at brúka av hesum inntøkum til at menna øki, sum annars í dag eru við skerdan lut. Gunnar Hoydal nevndi, at vit brúka part av oljupengunum til mentanina. Hesum sjónarmiði kunnu vit taka fult og heilt undir við. Spurningurin er so í hvønn mun hann heldur pengar, sum eru ætlaðir til førleikamenning her og nú eisini skulu fara til mentanarligt virksemi ella hann hugsar um tíðina, tá oljan spríkir upp og pengar koma í landskassan. Hyggja vit at gongdini í útlandinum og vísa á tann týdning oljan hevur havt fyri mentanina eitt nú tónleikin, so mugu vit eisini minnast til, at hetta er ein útviklingur, ið er komin í kjalarvørrinum á framleiðslu í mong ár.

Hvussu og ikki, so er tað gott at fáa tjak um hesar spurningar longu nú, og tað er at vóna, at hetta ikki at endar her, men heldur fram í fjølmiðlunum, á tingi og í øðrum forum við. Vit skulu brúka oljupengar bæði til førleikamenning og mentanarmenning. Við at stuðla útbúgving og gransking eru vit gott á veg.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Málið má loysast nú

**Jana H. Dalsgaard**
*forkvinna Sjúkrasystrafelag Føroya*



Sera álvarslig støða, ið nú stendst av, at tað ikki hevur eyðnast leiðsluni á LS at loysa trupulleikarnar á med. Deild B6.

### Leiðsluuppgáva

Sjúkrasystrafelag Føroya hevur allatíðina vist á, at málið á B6 er heilt avgjørt ein uppgáva hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum at loysa. Men vit kunna nú tíverri staðfesta, at tað ikki hevur eyðnast leiðsluni at loysa málið.

### Kann ikki góðtakast

Hvørki sum felag ella sum borgari í hesum landi kann man longur standa modell til tað sum nú hendir.Tá tað ikki eyðnasðist leiðsluni at loysa trupulleikan er nú tíð uppá, at politiski myndugleikin vaknar og tekur um endan.

Landsstýrismaðurin í almanna og heilsumáluum Sámal Petur í Grund hevur fyrr sagt, at málið ikki var búgvið hjá honum at leggja seg út í, men nú er tað væl hansara skylda

### Seinasti arbeiðsdagur

Í morgin er seinasti arbeiðsdagur hjá sjúkrasystrunum á B6, tær fara nú úr starvi og deildin letur aftur.At deildin ikki letur upp aftur eftir nýggjár kann fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri samfelagið sum heild. Alt tað sum er uppbygt ígjøgnum nógv ár verður sindrað eftir lítlari løtu. Føroyska samfelagið kann ikki verða B6 fyri uttan. Tann servitan sum sjúkrasystrarnar á B6 hava kann ikki erstattast. Tað kemur at kosta sjúklingum, starvsfólki og samfelagnum dýrt, eisini sum útbúgvingarstað fyri læknar og sjúkrasystrar. Sjúkrasystrafelag Føroya hevur eisini sagt frá tørvinum á sjúkrasystrum, ið stendur beint fyri durunum hjá okkum, tað vísa nýggjastu framrokningarnar, ið Sjúkrasystrafelag Føroya hevur gjørt. Um málið ikki verður loyst nú, kann óbótaligur skaði standast av hesum.

### Starvsfólkapolitikkur Landsins

Vit kunna ikki góðtaka, at stórur partur av okkara limum fær slíka viðferð sum sjúkrasystrarnar á B6 hava fingið í hesum máli. Sjálvt ikki starvsfólkapolitikkur landsins hevur verið fylgdur í hesum máli, tað er átalu vert. Tær hava seinastu nógvu árini arbeitt langt yvir evnir, tær hava annað uppiborið enn slíka viðferð.

### Málið má loysast nú

Um tørvur er á tí, er Sjúkrasystrafelag Føroya tilreiðar, at hjálpa til við at loysa málið, um heitt verður á okkum.

# Heilsur heim til skyldfólk og vinir í Føroyum!

**Akureyri 12.12.2001**

Í væl yvir tjúgu ár hava føroyingar á Norðurlandinu fingið høvi til at senda Jólaheilsur heim til skyldfólk og vinir. Ríkisútvarpið á Akureyri hevur við vælvilja loyvt okkum at taka Jólaheilsurnar upp hjá sær, Útvarp Føroya hevur so útvarpa teimum, og eru vit hesum báðum útvarpstøðum takksamir fyri lut teirra í hesum flutningi.

Nú sær út til at ikki verða sendar slíkar heilsur hetta árið, orsøkin er kanska helst hon, at tað fólk sum staðið hevur fyri hesum, eru við at verða eldri fólk, og ikki allt so fríkst longur, og ikki sær út at føroyingar leiti meir higar at búgva. Hóast skyldfólk og vinir heima ikki kunnu hoyra heilsuna senda, tá kunnu vit vissa tykkum um at hugurin er heima um Jól, og hóast fjørutiu og fimmtiu ár og hjá summum meir eru liðin síðan hildin vóru Jól heima í Føroyum, tá er húgurin heima og jólahaldið, sum tá var allt annarleiðis en nú er, tá er gleðin tann sama gleðin um at Hann, sum sagt hevði verið frá at skuldi koma, kom á Jólum. Fólkið sum gekk í myrkri fekk at síggja ljósið, ljósið sum rak burt myrkrið sum mannaættin hevði í angist livað undir.

Føroyingafelagið á Norðurlandinum sendir skyldfólk og vinum runt oyggjarnar kæra Jólaheilsur, somuleiðis senda vit øllum landsmonnum kærar heilsur við vón um at jólahátíðin verði gleðihátíð sum veitir birtu og yl.

**Føroyingafelagið á Norðurlandinum Akureyri**


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Framhaldssøgan um Oyrasundskollegiið

**Marjun Niclasen og Bjørg Jacobsen**

Dimmalætting skrivar 21. november undir yvirskriftini ”Føroysk ghetto skal syndrast”, at ”myndugleikarnir” eru farnir at spjaða føroysk lesandi, sum søkja bústað i Danmark. Orsøkin skal vera, at so nógvir føroyingar búgva á Øresundskollegiet (ØK).

Tað framgongur ikki beinleiðis, hvørjir hesir ”myndugleikar” eru; men Lennart Larsen hjá DIS (Ejendoms- og boligadministration, herundir ØK) verður endurgivin fyri at hava sagt, at føroyingar ofta velja bara at søkja bústað á ØK, og ”tað er ongantíð gott, tá ov nógvir tjóðskapir savnast eitt stað”.

Sissal Kristiansen, formaður í MFS, verður víðari endurgivin fyri at siga seg skilja avgerðina um at minka um talið á føroyingum á ØK og fáa føroyingarnar at spjaða seg meira, tí ”tað hevur givið trupulleikar, tá mentanir stoyta saman”, og lagt verður aftrat, at ”danir eru ikki so villir við føroyskum dansi, áhaldandi guitarspæli á náttartíð og so heldur ikki vid matarluktinum”; og avgerðin er tikin út frá ”áhaldandi klagum” (undirforstaðið um føroyingar).

3. desember er aftur ein grein í Dimmalætting. Hesa ferð eitur tað fyrst, at ”danskir myndugleikar” vilja minka talið á føroyingum á ØK; seinri eitur tað ”myndugleikin, sum stýrir studentaheiminum”. Greinskrivarin hevur samrøðu við Høgna Hoydal, sum verður endurgivin fyri at siga seg ætla at reisa málið um føroyingarnar á ØK í Fólkatinginum sum ein prinsipiellan spurning um rættindini hjá føroyskum útisetum í Danmark.

Hesar greinir hevur havt nakrar óhepnar fylgjur við sær:

1. Útvarp Føroya hevur – við Dimmalætting sum keldu – borið hesi tíðindi víðari, so nú skuldi trygging verið fyri, at tey flestu fólk í Føroyum hava fingið tað við.
2. Ein e-postur frá næstformanninum í MFS bleiv sendur út – undirritaðu fingu hann 6. desember - við tíðindum um, at leiðslan á ØK skal hava heitt á DIS og CIU (Centralindstillingsudvalget) um ikki at vísa fleiri føroyingum inn á ØK. Í e-postinum verdur heitt á móttakararnar um at møta upp á felagsfund fyri íbúgvarnar á ØK 12. desember og velja ávísan persón til nevndina, sum hevur sagt seg vera sinnaðan at kanna málið. Haraftrat verður mælt til at senda e-postin víðari til onnur á ØK; og sum skilst, er hesin e-postur farin víða um.
3. Fundurin 12. desember var merktur av hesum málinum. Leiðslan á ØK var bæði bilsin og vónsvikin av framfararháttinum hjá Dimmalætting, Útvarpi Føroya, MFS, og hvør annars hevur verið uppií. Tað vísti seg, at áðurnevndi persónur hjá DIS var skeivt endurgivin – ið hvussu er, tá hugsað verður um, hvørja niðurstøðu greinin hevði. Á fundinum bleiv sligið fast, at hvørki DIS CIU ella ØK hevur nakrantíð tikið ella umhugsað at tikið avgerð um at minka um ella steðga føroyingum í at flyta inn á ØK. Kjarnin í útsøgnini hjá DIS var, at um føroyingar (og onnur) seta fleiri kollegiir enn ØK á ynskilistan í bústaðarumsóknunum, er møguleikin at fáa ein bústað størri. Og tað er líkasum nakað heilt annað.
4. Leiðslan var somuleiðis bilsin og vónsvikin av pástandinum um, at føroyingar skulu eitast at verða serliga illa klagaðir vegna larm og matarlukt, og at hetta skal vera ein av orsøkunum til, at føroyingar skulu vísast burtur frá ØK. *Einki* hald er í hesum; tvørturímóti verða føroyingar *sjáldan* klagaðir.

Samanumtikið helt ØK-leiðslan helt tað vera nógv fyri, at útsøgnin hjá DIS er snarað til eina slíka niðurstøðu; at Dimmalætting (og Útvarpið) setir pástandir um leiðsluna á ØK fram uttan eina einastu ferð at hava sett seg í samband við hana; og at ein e-post kampagna – við skeivum pástandum um ØK-leiðsluna - varð sett í gongd aftanfyri ryggin á leiðsluni.

Ein skuldi so trúð, at nú var málið avgreitt og pástandirnir manaðir niður í jørðina. Men mín sann, um ikki Dimmalætting aftur 18. desember – heilar 6 dagar aftaná felagsfundin - borðreiðir við eini triðju grein, har Martin Mouritsen, nevndarformaður á Kagså Kollegiet verður endurgivin fyri at hava sagt seg vilja vera við til at loysa trupulleikarnar á lokalum plani, heldur enn á politiskum.

Hvørjar ”trupulleikar”? Hvør er tað í grundini, sum hevur ein trupulleika?

Hetta er ein álvarsom ákæra móti ØK, DIS ella CIU, ella hvørjir nú hesir ”myndugleikarnir” eru. At útihýsa ávísum tjóðskapum frá kollegium er – umframt ósympatiskt og óetiskt – beinleiðis ólógligt. Eisini er tað álvarsamt, at tann fyrsta greinin í Dimmalætting ført til ta næstu, har málið nú verður sett í samband við hugtakið ”etniskur bólkur”. Føroyingar í Danmark skulu sambært hesi grein ”sveima í einum l ø g f r ø ð i l i g u m ongamannalandi”. Og í tí triðju greinini verður orðið ”útreinskan” nevnt.

Frá málberingini ”etniskur bólkur” til ”útreinskan” er ikki langt til t.d. ”etnisk útreinskan”, sum jú er uppi í tíðini. Ein lesari, sum ikki hevur møguleika ella stundir at seta seg inn í viðurskiftini og í hesum føri bara hevur Dimmalætting og Útvarp Føroya sum keldu, kann lættliga fáa ta fatan, at føroyingar í Danmark verða so illa viðfarnir av donsku myndugleikunum, sum eisni skínur ígjøgnum greinarøðina sum ein reyður tráur. Og verður alt hetta samanhildið við tíðarinnar rák við fremmandahatri í Danmark og øðrum londum, ja so fæst tað, um ein vil, at passa so væl í eina ”sannleikamynd” av negativum viðurskiftum millum føroyingar og danir. - Hví uppfinna trupulleikar, har teir ikki eru til frammanundan og traðka á onnur uttan orsøk? Hvat hetta djúpast sæð botnar í, kann ein gera sær sínar egnu tankar um, men orð sum paranoia og undirlutakenslur falla okkum inn.

Tað er gott at gera vart við órætt. Men tá pástandir byggja á snaraðar upplýsingar, er tað dupult ringt. Í hesum føri er órættur gjørdur móti ”donskum myndugleikum” ella ØK-leiðsluni, sum er nóg ringt í sjálvum sær. Men haraftrat kemur, at teir partarnir í málinum, sum hava verið fyri órætti, fáa eitt petti til eina ávísa sannleikamynd av føroyingum og føroysku pressuni. Sostatt rakar hetta ófantaliga álopið hjá Dimmalætting nøkur onnur enn tey, tað vist var ætlað at raka, nevniliga okkum føroyingar á ØK og ikki minst Dimmalætting sjálva - sum ein boomerang.

Hvussu leingi sleppur henda lygisøgan at florera aftrat? Hvat skal til fyri at sannføra Dimmalætting um, at søgan var ein lodrøtt lygn frá byrjan av, sum bleiv størri og størri í yvir tríggjar vikur? Í greinarøðini hevur blaðið endurgivið samrøður við 4 persónar, harav bara 1 frá teimum sokallaðu myndugleikunum – og hon varð snarað. Hevur Dimmalætting hesar vikurnar ongantíð umhugsað at seta seg í samband við tann sentrala og ákærda partin, nevniliga ØK-leiðsluna?

# Viðmerking til Grækaris D. Magnussen

**Jógvan Poulsen**

Bert nakrar reglur til tín, Grækaris, um tað sum tú svarar mær aftur, men eg leggi ikki í svar aftur í bløðunum, tað skal vera á øðrum stað.

Sjálvandi roynir tú at klóra út yvir lortin hjá tær, men tað nyttar einki. Hetta er ikki misskilt, tí sum tú sjálvur skrivar, so búði Jákup á Oyri og ikki í øllum Føroyum, so húsið kann ikki vera langt vekk, sum hann vanliga gekk inn í. So forsvarar tú teg við, at tað var tá Severin var uml. 12–14 ára gamal – frá 1928 til 1930 – men tað er ikki nokk, tí tú skrivar, at í dag stendur tað honum púra greitt, so har er einki misskilt.

Set teg niður og hugsa teg væl um ta óbótagerð, tú hevur gjørt, og um skommina.

# Stórt jólablað

**Eins og undanfarin ár ger Sosialurin væl burtur úr jólunum. Í blaðnum, sum kemur í morgin, leygardagin, er eitt stórt innlegg á tremur við góðum lesitilfari**

Bókaormur á Morskranesi metir um heimsstøðuna:

## Endin er nær



– Tað eru tekin bæði í sól, mána og stjørnum um, at endin er nær. Hygg bara eftir gongdini í Ísrael, sigur Hensar Anthoniussen av Morkranesi

Ísraelsvinur í Hesti:

## Hjartað grætur fyri Heilaga Landinum



- Tað nýtir mítt hjarta at síggja allan harðskapin í sjónvarpinum, og serliga, at Guds fólk eisini luttekur í hesum harðskapi, sigur Johan W. Niclasen

**Umframt eru hópin av samrøðum, eitt nú við Fríðbjørg Jensen á Sandi, sum hevur mist trý børn, greinum, hugleiðingum, minnisbrotum, ummæli, hugstroyggi og øðrum. Eitt fjølbroytt og spennandi blað at taka fram um høgtíðina.**